# Jól í Suður-Korea

Í Suður-Korea eru jólini ein almenn høgtíð. Suður-Korea er einasta landið í Eystur-Asia, har Jólini eru ein almenn høgtíð. Men tey ikki-kristnu arbeiða og virka, sum vanligt jóladagarnar. Men hesi luttaka í pørtum av jólasiðunum. Sum at geva gávur, senda jólakort, og at hava eitt jólatræ í heiminum. Jólamaðurin verður nevndur Santa Haraboji – jólaabbin – í Suður-Korea. Útvarpsstøðirnar spæla jólatónleik jóladagarnar, og dagarnar áðrenn jól. Og sjónvarpsstøðirnar vísa jólafilmarnar, sum eisini eru kendir frá Vesturheiminum. Handlarnir í Suður-Korea gera alsamt meiri burtur úr Jólunum. Næstan øll tey kristnu fara í kirkju á Jólum. Aftaná jólaguðstænasturnar er siður, at tey ungu fara at vitja tey gomlu, og syngja jólasangir fyri teimum. Har fáa tey so ein heitan munn, og onkran góðan bita.





















